ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

26. juni 2023
J.nr: 23/12829-4
Tygara skriv:
Viðgjørt: Barbara Álvsdóttir Thomsen

Nr. 52-123/2022

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um heim í Suðuroynni, settur landsstýriskvinnuni í almanna- og mentamálum, Sirið Stenberg (at svar skrivliga eftir TS § 52a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvør er grundgevingin fyri, at uppruna ætlanin um heimið í Suðuroynni fyri borgarar við avbjóðingum er broytt?
2. Hvussu nógvar borgarar hevur Almannaverkið á bíðilista til bútilboð í Suðuroynni?
3. Fer heimið, sum er í umbúna, at nøkta akutta tørvin, og verða møguleikar fyri at víðka um tilboðið?

Til nr. 1
Upprunaliga vóru 10 smærri kømur í húsinum. Av tí at fólkini, ið hava tørv á bútilboð í Suðuroy hava rættiliga ymiskan tørv, hevur Almannaverkið valt at gera nøkur av kømrunum til íbúðir. Sostatt eru nú fimm 1-rúms íbúðir og tvær 2-rúms íbúðir í húsinum.

Til nr. 2
Í løtuni standa sjey fólk á bíðilista til bútilboð í Suðuroynni. Ein av hesum sjey hevur ikki tørv á bútilboð enn.

Til nr. 3
Við nýggja heiminum verður mest átrokandi tørvurin í Suðuroynni nøktaður. Roknað verður við, at nøkur av fólkunum á bíðilistanum, taka ikki av tilboði um búpláss í fyrstu atløgu, men heldur ynskja tilboð um umlætting.

Vit hava ikki kannað, um tað ber til at víðka um júst hatta tilboðið, sum liggur við Sílá, men um tað ikki ber til, tá tørvur verður á tí, so eru aðrir møguleikar í oynni.

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna